# Petur Simonsen 60 ár



Í morgin, leygardagin 7. juli, verður Petur Sigurðson Simonsen í Havn 60 ár. Petur er stjóri í Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð, og hann hevur í mong ár verið fótbóltsvenjari.

Mamman var Martha (1910-1995) fødd Joensen og ættað úr Jógvansstovu í Leirvík. Pápin var Sigurd (1912-1994) ættaður Uppi í Húsi í Sandavági. Tey bæði búsettust í Fuglafirði, har Sigurd var skipari og reiðari, og Martha ansaði barnaflokkinum, sum fevndi um níggju børn: Ása (1934), Árni (1936-1999), Marjun (1937), Anna (1940), Sigurd (1942), Hjørdis (1944), Petur (1947), Randi (1950) og Jákup (1952).

Ása og Sigurd búgva í Fuglafirði, Anna býr niðri, og hini búgva í høvuðsstaðnum. Petur er uppkallaður eftir abbanum í Sandavági, Peturi Simonsen Uppi í Húsi. Teir eru tríggir, sum eita Petur Simonsen eftir sama abba. Hinir eru Petur Simonsen á Eiði, sum í mong ár arbeiddi í Radiobúðini í Runavík, og hin er Petur Højgaard Simonsen á Barnaheiminum.

Petur tók studentsprógv í Keypmannahavn í 1969. Áðrenn Petur fór á Læraraskúlan, var hann vikarur í Skúvoy. Eftir lokið lærarasprógv í 1974 var Petur lærari í Venjingarskúlanum í tvey ár, áðrenn hann gjørdist lærari í heimbygdini. 1979-80 røkti Petur varaskúlastjórastarvið í Fuglafirði.

Petur hevði ábyrgdina av bókasavninum í Fuglafirði 1983-88, og í 1989 tók hann skúlabókavarðaprógv í Føroyum. 1980-88 var Petur limur í skúlanevndini í Fuglafirði. Millum fleiri onnur álitisstørv, sum Petur hevur røkt, er sessur í stýrinum fyri Føroya Blindastovn og sessur í stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús.

Í 1987 gjørdist Petur leiðari í Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð. Í tí sessinum situr hann framvegis. Í eitt ár var hann skrivstovustjóri á Løgmansskrivstovuni.

Í øllum, sum Petur fæst við, er hann álitisfullur, støðugur og neyvur.

Petur hevur verið ógvuliga virkin í ítrótti. Í lestrartíðini spældi hann hondbólt við Kyndli og flogbólt við Lærarskúlanum. Eftir at hann var fluttur aftur til Fuglafirðar, var Petur formaður í ÍF 1978-82. Tað var í hansara formanstíð, at ÍF vann fyrsta og higartil einasta FM heitið, og tað var í hansara formanstíð, at ódnartakið varð tikið at víðka um fótbóltsvøllin í Fuglafirði.

Petur var hondbóltsvenjari og flogbóltsvenjari í Fuglafirði, og tá fór hann eisini undir karrieru sum fótbóltsvenjari. Petur hevur í fleiri skiftum verið venjari í Fuglafirði, og eitt nú á Skála, í NSÍ, B68, KÍ og í tveimum umførum í B36. Petur hevur lokið hægstu venjaraútbúgving, sum tað ber til at taka í Føroyum. Í 1994 og 1995 var hann hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, sum tá var vorðin landsliðsvenjari, og tey seinnu árini hevur Petur saman við øðrum í FSF høpi havt ábyrgdina av at útbúgva nýggjar føroyskar fótbóltsvenjarar.

11. oktober 1969 giftist Petur Gunrið fødd Guttesen og ættað úr Havn. Tey eiga hugnaligt og gestablítt heim við Dalavegin í Havn. Gunrið og Petur eiga fimm børn: Marta á Lakjuni (1970), Pavla Eliasen (1971), Sigrun Kabeya (1974), Jens Sigurð (1981) og Leivur (1987). Marta býr í Fuglafirði, Pavla og Jens Sigurð búgva niðri, Sigrun í London og Leivur í Havn. Abbabørnini eru 11 í tali - 7 dreingir og 4 gentur.

Petur dámar væl sang og tónleik, og hann syngur í Ebenezerkórinum.

**J**

# Jógvan Telling 60 ár



Leygardagin 7. juli fyllir havnarmaðurin og tónlistamaðurin Jógvan Joensen, Jógvan Telling, seksti ár.

Jógvan trein inn á føroyska tónleikapallin við bólkinum Cream Crackers í 1966, og nøkur ár seinni var hann ein av teimum, sum spældu og sungu á fyrstu plátuni við kabaretsangarum. Summir gjørdust landapláguur – eitt nú Sektus og Sekterius.

Jógvan vaks upp í tí tá nýggja býlinginum á Bókbindaratrøðni í eysturbýnum, har fólk settu seg niður síðst í 40- og 50-árunum, tá eitt nú Lonirnar vórðu bygdar. Dreingirnir har um leiðir fingu heitið »lonadreingir« og tiltiknir vóru teir í bardøgunum við dreingir í øðrum býlingum.

Ein tann fremsti í hesum »heri« var Birgar Johannessen. Jógvan var neyvan í fremstu røð, men nøkur ár seinni stóðu teir báðir á palli saman við Torkili Thomsen og Sigurdi Bech í bólkinum við sjáldsama navninum Cream Crackers. Henda karrieran vardi ikki so leingi, tí Jógvan fór til Danmarkar at fáa sær útbúgving.

Men tíðin í Danmark var gróðrarrík fyri tónlistarligu leiðina hjá Jógvani. Umframt ep-pláturnar við sangum frá studentakabarettum, kom kenda og nýskapandi lp-plátan hjá Harkaliðnum, plátan hjá Jógvani og vinmonnum við eitt nú kenda sanginum, Skiparin lítli, sum var í hvørjum kvøðuljómum í fleiri ár. Hetta lagið – eins og lagið til yrkingina, Meg minnist eina mynd, man vera eitt ta besta lagið hjá Jógvani Telling, sum hann fekk sær sum »kunstnara-navn« – eftirnavn hjá abbanum í móðurætt.

Aðrar plátur frá hesum árum er t.d. plátan hjá Manningini, Jógvan í Kátuvík og Jógvan og Annika, sum hann sang og spældi nógv saman við í langt áramál.

Heimkomin til Føroya við tónleikaútbúgving frá konservatoriinum virkaði Jógvan ikki bara sum lærari í tónleiki, men fekk eisini kórið Glymur upp á beinini. Eisini tað kórið kom út við bandi. Ljóðførið hjá Jógvani var guitarin, men hann spældi fleiri onnur streingjaljóðføri og klaver.

Tað, Jógvan hevur gingið upp í, hevur hann gjørt av fullum huga. Hann er nærlagdurog áhaldandi.

Tíverri endaði virkna tónleikalívið hjá Jógvani brádliga, tá hann gjørdist sjúkur og førleikaskerdur. Eftir at hann kom fyri seg, hevur hann íðkað ítróttargreinina bocchia. Hann hevur verið við í kappingum bæði í Føroyum og uttanlands og hevur vunnið fleiri ferðir.

Jógvan er sonur Maju og Eigil. Hon er úr Havn og hann úr Vági. Eigil, sum var bakari hjá Frants í meira enn 50 ár, doyði fyri nøkrum árum síðani.

Føðingardagin heldur Jógvan í summarhúsi í Danmark.

Hjartaliga tillukku við teim seksti og alt tað besta frameftir.

**Jóhan**

# Summarfestivalurin væl koyrandi

TÍÐINDASKRIV

Samstarvsavtala er gjørd millum Summarfestivalin í Klaksvík og P/F Ivan Johansen Bilar.

Avtalan hevur m.a við sær at fyrireikararnir koyra í einum Chrysler PT Crusier, sum er bæði sjónligur og eitt snið til tann, ið vil eitt sindur meira enn "bert" ein vanligan bil, sigur sølustjórin hjá P/F Ivan Johansen Bilum, Pauli Waag, ið er væl nøgdur við samstarvið "Vit hava eitt breitt úrval av bilum, sum vit kunnu bjóða fram. Bilar sum eru praktiskir og bæði nøkta kravið til góðsku og koyrieginleikar.

Chrysler PT Crusier er so bilurin, sum verður nýttur í fyrireikingartíðarskeiðnum. Annars verður flutningstørvurin nøktaður, so hvørt sum festivalurin nærkast, og meðan festivalurin er, sigur Pauli Waag, sum leggur afturat at samstarvið millum Summarfestivalin og P/F Ivan Johansen Bilar er ein góð avtala fyri báðar partar, tí greitt er, at mongu gestirnir skulu flytast aftur og fram, og tað er ikki uttan treytir og trygd

Partarnir eru samdir um at samstarvið við Summarfestivalin í ár skal verða støði undir framhaldandi samstarvi.




*Pauli Waag, sølustjóri hjá Ivan Johansen Bilum, handar PT Cruisarin til Steintór Rasmussen frá Summarfestivalinum*